8. oktober 2026

Ásetan av mesta innistandandi í peningastovnunum

Fleiri atlit skulu ella kunnu takast í sambandi við áseting av mesta innistandandi.

Atlit skal í fyrsta lagi takast til viðmerkingarnar til lógina.

Viðmerkingar til lógina: *Orðingin um, at samváðin millum landsins gjaldføri og føroyska búskapin skal vera sum minst, merkir, at gjaldføri í peningastovnum, lánsbrævaútgevarum v.m., ið kunnu væntast at verða serliga hart raktir, um tað gongur illa í føroyska búskapinum, ikki verður meira enn neyðugt er til vanliga raksturin av landinum.*

Í øðrum lagi skal atlit takast til ymsar upplýsingar um sjálvan peningastovnin. Tann mest týðandi upplýsingin er, um peningastovnurin er ein SIFI-fíggjarstovnur.

SIFI er stytting fyri Systemically Important Financial Institutions. Sum heitið sigur, so eru SIFI-fíggjarstovnar teir peningastovnar, sum verða mettir at vera so týðandi fyri peningakervið, at um teir fara á húsagang, so fer tað at føra til stóran skaða fyri samfelagið. Tað er tí sannlíkt, at statsmyndugleikarnir ikki fara at lata ein SIFI-fíggjarstovn fara á húsagang.

Í Føroyum eru Betri Banki og Føroya Banki SIFI-bankar.

Til at meta um mótpartsváðan av peningastovnum, sum ikki eru SIFI-peningastovnar, eru niðanfyristandandi atlit tey týdningarmestu.

1. Stødd av javna
2. Eginpeningur
3. Gjaldføri
4. Tap og avsetingar
5. Primerur rakstur
6. Diamanturin hjá Fíggjareftirlitinum
7. Seinasta vitjan av Fíggjareftirlitinum

Diamanturin hjá Fíggjareftirilitinum umfatar lyklatøl, sum siga nakað um, hvussu Fíggjareftirlitið metir mótpartsváðan í ymsum peningastovnum.

Landsbankin ger, við at nýta hesi lyklatøl, minst einaferð árliga eina meting av váðanum av ymiskum peningastovnsmótpørtum.

Tvær ásetingar eru neyðugar. Ein um mesta innlán í einstøkum peningastovnum, og ein um mesta innlán í føroyskum peningastovnum tilsamans.

Ásetingar um mesta innlán í einstøkum peningastovnum.

A. Mesta innlánsupphædd í útlendskum SIFI-peningastovnum, við undantaki av depotkontum, er 200 mió. kr. í hvørjum peningastovni.
B. Í hvørjum føroyskum peningastovni sær kunnu mestu upphæddirnar vera sum víst í talvuni niðanfyri. Fer upphæddin upp um, skal hetta fáast í rættlag innan 30 dagar.

- Betri Banki: 250 mió. kr. (SIFI)
- Føroya Banki: 250 mió. kr. (SIFI)
- Norðoya Sparikassi: 30 mió. kr. (ikki SIFI)
- Suðuroyar Sparikassi: 20 mió. kr. (ikki SIFI)

Áseting um mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum tilsamans.

Harumframt er neyðugt at gera eina áseting um mesta innistandandi í føroyskum peningastovnum tilsamans. Gjaldførið sveiggjar nógv í einstøkum mánaðum, serliga í døgum við pensjóns- og lønargjaldingum og í døgum við skattagjaldingum. Gjaldførið broytist eisini nógv yvir árstíðirnar.

Til at taka nøkur av stóru gjaldførissveiggjunum, hevur Landsstýrið niðanfyrinevndu kassakredittir:

- Betri Banki: 50 mió. kr.
- Føroya Banki: 30 mió. kr.
- Nordea Bank: 100 mió. kr.

Harumframt kann Landsbankin nýta repo fígging. Hetta merkir at selja lánsbrøv, og avtala at keypa tey aftur eftir eitt ávíst dagatal, til dømis eftir 14 dagar. Vanliga verður hetta nýtt til stutttíðarfígging, har upphæddin liggur millum 50 og 200 mió. kr. Hetta slagið av fígging verður brúkt 5-15 ferðir árliga.

<u>Áseting um mesta innlán í føroyskum peningastovnum tilsamans:</u>

Mesta innlánsupphædd ella avtaluinnlán tilsamans í øllum føroyskum peningastovnum verður ásett at vera 500 mió. kr. Fer upphæddin upp um, skal hetta fáast í rættlag innan 30 dagar.

